# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Fyrst og fremst, so er talan um ein góðan venjara. Men eitt navn sum Jakob Friis-Hansen ávirkar eisini positivt í so nógvar aðrar mátar*

*Todi Jónsson, Fremad Amager*

# Stórt venjaranavn til Fremad Amager



*Jakob Friis Hansen hevði eina drúgva yrkisleið á Fraklandi og Týsklandi sum spælari. Og sum venjari verður hann eisini roknaður millum teir fremstu í Danmark*

*Mynd: Polfoto*

**Við Jakob Friis Hansen hevur Fremad Amager fingið ein veruligan profil á venjarasíðuni. Todi Jónsson er sannførdur um, at hetta bæði nú og í framtíðini fer at styrkja profilin hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár kundi Fremad Amager á tíðindafundi boða frá, at nýggjur venjari er settur fyri Peer F. Hansen. Í farnu viku kom fram, at sáttmálin hjá Peer F. Hansen ikki skuldi leingjast, og skjótt varð gitt, at Friis Hansen skuldi verða nýggjur venjari.

**Eitt stórt navn**

Og Jakob Friis Hansen er ikki ein og hvør í donskum fótbóltshøpi. Á yrkisleiðini spældi hann fótbólt í bæði Fraklandi og Týsklandi, og eisini var hann 19 ferðir á danska landsliðnum.

Aftur komin fór hann alt fyri eitt undir sonevndur ex-prof venjaraútbúgvingina, seinastu tíðina hevur hann virkað sum venjari hjá HIK. Sama felag, sum nýggi stjórin í Fremad Amager, Nikolaj Kaas-Heilman starvaðist í fram til mars mánað.

Hóast HIK ikki telist millum størstu feløgini í Danmark, so hevur Friis Hansen alla tíðina verið serstakliga væl lýddur sum venjari. Sum skilst, so hevur hann eisini fingið tilboð frá onkrum superligu-felag, men av privatum ávum hevur hann ikki tikið av tilboði, sum bar ov nógva ferðing við sær.

**Positiv profilering**

Setanin av einum stórum venjaranavni sampakkar væl við ætlanina á Amager, har boðini alt fyri eitt vóru, at byrjast skuldi á toppinum við sterkari umsiting, fyri síðani at arbeiða seg niðureftir. Altso ikki ein ætlan, har fyrsti setningurin var at keypa hópin av nýggjum spælarum.

Og føroyski høvuðsmaðurin í felagnum, Todi Jónsson, er eisini skjótur at staðfesta, at teir í Friis-Hansen hava fingið eitt sera gott navn.

- Fyrst og fremst, so er talan um ein góðan venjara. Men eitt navn sum Jakob Friis-Hansen ávirkar eisini positivt í so nógvar aðrar mátar. Umrøðan í miðlunum snýr seg um "store planer" og "ambitiøse Fremad Amager", og tað skapar sjálvandi eina positiva synergi. Og alt annað lika, so vil ein góður venjari hava lættari við at draga góðar spælarar til sín.

- Samanlagt eri eg tí ikki í iva um, at setanin av Jakob Friis Hansen er eitt stórt fet í okkara ætlanum um menning av felagnum, sigur Todi Jónsson.

## Charlton úr Premier League

**Eftir sjey ár í Premier League má Charlton nú ganga tungu leiðina niður í næstbestu deildina**

Sigurin var eitt krav hjá Charlton, tá teir í gjárkvøldið fingu vitjan av Tottenham. Taptu teir dystin, máttu teir taka við avleiðingini, sum var eitt pláss í næstbestu deildini komandi kappingarár. Við málum frá Dimitar Berbatov og Jermaine Defoe vann eitt væl upplagt Tottenham-lið lokaluppgerðina, og so var eingin vegur aftur hjá Charlton.

Umframt Charlton, er Watford longu flutt niður í næstbestu deildina. Triði niðurflytarin verður funnin um vikuskiftið, har Sheffield United, Wigan og West Ham øll eru í vanda fyri at flyta niður.

Tveir av uppflytarunum til Premier League eru funnir. Sunderland og Birmingham flyta beinleiðis upp, meðan Derby, West Bromwich, Wolverhampton og Southhampton skulu spæla play-off endaspæl um seinasta uppflytingarsessin.

*-pætur*

## Newcastle vil hava Allardyce

Newcastle-formaðurin Freddy Shepherd fer fyri aðru ferð at bjóða Sam Allardyce leysa managersessin í Newcastle. Sunnudagin staðfesti Shepherd annars, at hann als ikki hevði tosað við Allardyce, sum fyri trimum ári síðani takkaði nei til sessin, tá hesin stóð honum í boði.

Avgerðin hjá Allardyce um at gevast í Bolton setti tó alt fyri eitt ferð á gitingar um, at hann var ávegis til St. James's Park. Og at Roeder nú er farin úr sessinum hevur sum so bara styrkt hesar gitingar.

Og nú rokna enskir miðlar við, at fyrrverandi Bolton-venjarin fær boðið starvið seinnapartin í dag.

Alan Shearer er eisini eitt navn, sum hevur verið nevnt fleiri ferðir, men sjálvur hevur fyrrverandi liðskiparin hjá Newcastle ikki skumpað nakað sum helst undir hesi tíðindi. Onnur nøvn, sum hava verið nevnd, eru Mark Hughes, Sven-Goran Eriksson, Steve McLaren og Sevilla-venjarin, Juande Ramos.

*-mørk*

## Ball-stempling skal umrøðast

Enska fótbóltssambandið fer í dag at gera av, hvørt Michael Ball hjá Manchester City skal fáa leikbann. Dómarin legði ikki til merkis hendingina, tá Ball traðkaði á ein liggjandi Cristiano Ronaldo í grannauppgerðini móti Manchester United. Sjónvarpsmyndirnar lótu tó ongan iva verða um, hvat gekk fyri seg, og tí er væl hugsandi, at talan verður um drúgt leikbann fyri verjuspælaran.

*-mørk*